**Magnus Heinason - Túrfrágreiðing**
**Yvirlitstrolingar. Túrur nr. 1404.**
**Tíðarskeið: 19/2-5/3 - 2014**

---

**Fólk við frá Havstovuni:** Poul Vestergaard, Dagunn H. J. Clementsen (fyrru viku)/Jens Arni Thomassen (seinnu viku), Lise Ofstad (til sunnudag 23/2)/Lis Larsen (frá sunnudegi) og Petur Steingrund.

**Ábyrgd:** Petur Steingrund.

**Endamál:** Hetta var fyrri túrurin av yvirlitstrolingunum á vári í ár. Høvuðsendamálið við túrinum var at fáa til vega tilfar, ið skal nýtast í stovnsmetingunum av toski, hýsu og upsa, t.e. veiða í vekt og í tali, longdarbýti, vektbýti, aldursbýti, kynsbýti og kynsbúning av nevndu sløgum. Umframt skuldi vekt, tal og longdarbýti skrásetast fyri øll fiskasløg, ið vórðu veidd. Eisini skuldu magakanningar gerast av toski, hýsu, upsa.

**Eyka uppgáva:** Vit tóku nytrur og magar frá brosmu og longu. Uppgávan at taka eyka hál, har nógv gýtandi sild var, var ikki gjørd, tí so lítið av sild var at fáa. Fimm menn frá JT-Electric vóru við í tveir dagar fyri at royna videoútgerð, har myndir kundu síggjast av trolinum og hvussu tað fiskaði.

**Reiðskapur:** 116 fóts kassatrol við 40 mm meskum í posanum. Steinham lemmar. Breitlar 60 og 120 m.

**Um túrin:** Fóru út hóskvøldið kl. 22 og byrjaðu at taka støðir á Sandoyarbanka. Tóku støðir eystan fyri Nólsoy sunnudagin og fóru inn á Havnina at skifta fólk. Vit landaðu mikumorgunin á Bacalao og fingu menninar frá JT-Electric við. Tóku støðir eystanfyri á Suðuroyarbanka og Nólsoyarbanka mikudagin og hósdagin og fóru inn á Havnina hóskvøldið við monnunum frá JT-Electric. Tóku síðan støðirnar lidnar eystanfyri og fóru á Norðhavið seinna vikuskiftið. Vit tóku allar støðirnar norðanfyri og á Mýlingsgrunninum. Tilsamans tóku vit 64 støðir og bert ein støð mátti takast umaftur. Veðrið var misjavnt, til tíðir gott og til tíðir ringt.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Túrurin var liðugt rættaður 8. mars. Ynskiligt er, at nytrurnar skulu vera lisnar og innlagdar í databasu í seinasta lagi 15. apríl.

**Fyribilsúrslit:** Tað var tað sama at fáa av toski sum í fjør. Toskurin var væl fyri, tó at lítið av nebbasild var í fiskamagum. Vit fingu eitt sindur minni av hýsu og upsa, men meira av hvítingsbróðri og svartkjafti. Vit fingu nógv av lýri (*Pollachius pollachius*) í einum háli norðanfyri. Ein fullfíggjað samanbering við 2013 fæst við at hyggja at túrfrágreiðingini fyri túr 1406.

**Talva 1**. Veiða, og nytrur og magar tikin á túri 1404 (fyrra helvt av yvirlitstrolingini í mars 2014).

| FISKASLAG | KG í 64 støðum í 2014 | Nytrur | Magar | KG í 100 støðum í 2013 | Lutfall KG per støð |
|---|---|---|---|---|---|
| TOSKUR | 9017.54 | 630 | 183 | 14155.38 | 1.00 |
| HVÍTINGSBRÓÐIR | 4856.40 | | | 4169.16 | 1.82 |
| HÝSA | 4842.76 | 639 | 177 | 8627.61 | 0.88 |
| UPSI | 4533.58 | 597 | 164 | 7683.54 | 0.92 |
| SVARTKJAFTUR | 3368.86 | 91 | | 2146.18 | 2.45 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 3017.10 | | | 3259.89 | 1.45 |
| LÝRUR | 1975.95 | 15 | 5 | 127.35 | 24.24 |
| GULLAKSUR | 1614.64 | | | 2651.08 | 0.95 |
| SILVURMURTUR | 1463.21 | | | 277.47 | 8.24 |
| LONGA | 959.79 | 78 | 20 | 1766.40 | 0.85 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 363.74 | | | 455.08 | 1.25 |
| REYÐSPRØKA | 354.25 | | | 927.66 | 0.60 |
| HVÍTINGUR | 209.69 | | | 204.97 | 1.60 |
| TUNGA | 182.13 | | | 260.11 | 1.09 |
| SKRAMBUL | 147.69 | | | 178.20 | 1.30 |
| BROSMA | 145.94 | 31 | 6 | 269.59 | 0.85 |
| KNURRHANI | 123.94 | | | 178.56 | 1.08 |
| LOLIGO | 70.38 | | | 106.56 | 1.03 |
| HAVTASKA | 53.81 | | | 78.88 | 1.07 |
| SANDSPRØKA | 40.20 | | | 133.20 | 0.47 |
| TRANTKONGAFISKUR | 30.34 | | | 528.04 | 0.09 |
| ROGNKELSI | 26.24 | | | 21.24 | 1.93 |
| HAVMÚS | 24.06 | | | 227.22 | 0.17 |
| HVASSASPREK | 23.75 | | | 57.25 | 0.65 |
| LÁLLA | 22.20 | | | 29.64 | 1.17 |
| BLÁLONGA | 17.92 | | | 153.27 | 0.18 |
| ELEDONE | 11.41 | | | 0.74 | 24.19 |
| MAKRELUR | 9.97 | 6 | | 23.03 | 0.68 |
| STEINBÍTUR | 9.57 | | | 2.24 | 6.69 |
| LÍTLA BROSMA | 8.92 | | | 78.15 | 0.18 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 6.08 | | | 20.82 | 0.46 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 5.31 | | | 1.20 | 6.91 |
| SILD | 4.50 | 7 | | 5.24 | 1.34 |
| GLASKVOYSA | 2.31 | | | 23.35 | 0.15 |
| KALVI | 1.26 | | | 13.11 | 0.15 |
| TINDASKØTA | 0.82 | | | 34.22 | 0.04 |
| JÁKUPSSKEL | 0.48 | | | 9.86 | 0.08 |
| GLÝSUFISKUR | 0.18 | | | 6.94 | 0.04 |
| TANNHØGGUSLOKKUR | 0.17 | | | 0.00 | |
| LODNA | 0.05 | | | 0.02 | 4.78 |
| NEBBASILD | 0.01 | | | 0.03 | 0.30 |
| TILSAMANS | 37547.12 | 2094 | 555 | 49074.14 | 1.20 |

**Viðmerkingar:** Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í Tur1404d.doc.

Petur Steingrund